*Ráværuna keypa tey úr USA. Henda er sera kostnaðarmikil, men úrslitið verður eisini hareftir – so gott, sum myndin ber fullgott prógv um*



**Vit ynsktu sjálvi at gerast gomul í Føroyum, men vit vildu ikki bara sita fyri einki. Vit vildu hava okkurt munagott at gera**

*Vakur prýðislutur av Eiði*



# Hugskotini koma meðan



*- Eg fái alla tíðina nýggj hugskot, sum eg havi hug at royna í verki, sigur Elisabeth, her við einum av formunum hon brúkar at stoypa við*

**Síðani á heysti 2002 hava eftirløntu hjúnini, Elisabeth og Páll Ellingsgaard rikið verkstaðin Glarlist á Eiði.**
**- Hóast vit hava nógv ymiskt at selja, er ein alla tíðina noydd at finna uppá okkurt nýtt, sigur tann virkna Elisabeth**

LISTHANDVERK
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Eiði:** Tað sær kanska ikki beinleiðis út sum eitt virkið arbeiðsstað, teir tríggir blálittu skúrarnir her Uppi á Grind, tey kalla.

Men eingin skal vera í iva um, at inni í bygninginum trívast eini tilkomin hjún væl í arbeiðinum við dreymum sínum: At hava glarlist sum vinnuveg í Føroyum.

Framsýningarhølið er besta prógvið um, hvussu tað kann ganga, tá tvey fólk seta sær okkurt fyri - og haraftrat megna at fáa tað at bera til:

Eftir góðum fýra árum kann Glarlist bæði framleiða og selja glarvørur á høgum støði, bæði til føroyingar og útlendingar. Og tað stendur heldur ikki á at sleppa at við hesar vørurnar.

- Okkurt tíðarskeið vóru vit simpelthen noydd at arbeiða í døgndrift, greiðir Elisabeth Ellingsgaard frá.

Hon lærdi annars til sjúkrasystir seinast í fimmti-árunum, men tey seinnu árini hevur hon kastað seg yvir glarlistina.

Hóast hon er farin um 70 ár, so tróta hugskotini ikki, sum hon ætlar sær at fara undir.

- Hugskotini, tey koma meðan eg arbeiði. Ein er jú alla tíðina noydd at finna uppá okkurt nýtt.

- Nú ætli mær at seta meg meiri inn í, hvussu tey framleiða smúkkur!, sigur hon.

## Váðaverk til veruleika

Elisabeth og maðurin byrjaðu annars virksemið í smáum, men skjótt vísti tað seg, at slíkt ítriv og slíkt virksemi kravdi bæði pláss og tíð.

Tey keyptu fyrst ein containara til virksemið. Stutt eftir keyptu tey ein aftrat og at enda ein triðja fyri at rúma øllum. Maðurin riggaði og snøggaði alt soleiðis til, at tey bæði nú bæði hava verkstað og framsýningarhøli í hesum trimum containarunum Uppi á Grind á Eiði.

Onkur helt kanska tá, at her var talan um eitt váðaverk, tá farast skuldi eina so nýggja vinnu í Føroyum. Eingin hevði jú roynt júst hetta áður, um ein sær burtur frá teirri listini sum listamaðurin Tróndur Patursson hevur latið úr hondum.

Men Elisabeth og Páll lótu ikki við seg koma, men hildu fast við dreym og hugskot teirra. Í dag man neyvan nakar vera í iva um, at glarlistin er komin fyri at verða.

- Men lat meg so beinanvegin sláa fast, at tað var sera kostnaðarmikið at fara í gongd. Her skulu nógv amboð til og ovnarnir eru eisini dýrir.

- Og ráværan, sum vit fáa úr USA, er eisini sera dýr, greiðir Elisabeth frá. Prísurin á glarlistini er tí lagaður eftir hesum umstøðunum.

## Óvæntað marknaðarføring

Tá ein byrjar eitthvørt virksemi er avgerandi neyðugt at fólk verða varug við tað, ein er farin undir. Hetta kallast marknaðarføring.

- Men hetta høvdu vit næstan ikki tíð at hugsa eitt einasta petti um. Vit høvdu alt ov nógv at gera ta fyrstu tíðina, sigur hon.

Tilboðið um marknaðarføring kom kortini til teirra frá heldur óvæntaðum staði: SMS í Havn. Møguleiki varð nevniliga at fara á sølutorgið har at vísa fram og selja glarlist teirra nakað undan jólum í 2002.

- Eg veit ikki, hvat hendi. Men har komu tíðindafólk og fjølmiðlar rennandi og vildu hava okkum at greiða